# TILTØK

**Gudstænastur**
**Leygarkvøldið 7. mai**
Konsert í Christianskirkjuni kl. 19.00 v/ Havnarkórinum o.ø.

**Gudstænastur**
**6. sunnudag eftir páskir**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11, Bergur D. Joensen, altarg.
***Argja Kirkja:*** kl. 11, Heri Joensen, altarg.
***Havnar kirkja:*** kl. 11, Bjarni Bæk, altarg., skriftamál kl. 10.30
***Kaldbak:*** kl. 12, Sonja Klein
***Vestmanna:*** kl. 11, Inga Poulsen Dam
***Miðvágur:*** kl. 11, altarg., David Johannesen
***Haldarsvík:*** kl. 11,
***Tjørnuvík:*** kl. 12, Marjun Bæk
***Hósvík:*** kl. 11, Mogens Tilsted Christensen
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11, Martin R. Jacobsen
***Rituvík:*** kl. 11, Meinhard Bjartalíð, altarg.
***Kirkju kirkja:*** kl. 12, altarg.,
***Hattarvíkar kirkja:*** kl. 17, altarg., Elsa Funding.
***Christianskirkjan:*** kl. 11, Hans Eiler Hammer
***Kunoy:*** kl. 12, altarg., Niels Pauli Danielsen
***Skopun:*** kl. 12, Jóanes Fonsdal og Sverri Steinhólm, barnakór syngur
***Dalur:*** kl. 12, Jákup R.Hansen
***Tvøroyri:*** kl. 11, altarg., Jónsvein Bech
***Porkeri:*** kl. 12, altarg., Patrick de Neergaard

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag, leygardagin kl. 17 Landsbøn,
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen,
kl. 11.50 Sunnudagsskúli.
Einki ABC vegna missiónskunning, kl. 18 Møti.
Um tær tørvar persónliga samørðu og/ella forbøn ring 211067.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin.
www.filadelfia.fo

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin kl. 10.30 á Familjumøtinum verður frásøgn frá Sri Lanka, tað verður Stella ið greiðir frá. Kl. 11.30 samvera við drekka. Á tilbiðjanarmøtinum er evnið »Kærleiki Guds«, talari verður Jógvan Z. Barnaansing undir møtinum. Kl. 12 Sunnudagsskúli. www.livdin.fo

**Frá Ebenezer**
Fríggjadagin kl. 20 Teen-Night.
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, Betesdakórið syngur.
Mánadagin kl. 17 Kvinnur koma saman til bøn í Sloans húsi. Øll eru vælkomin.
www.ebenezer.fo

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Møti sunnumorgunin kl. 10.30 Breyðbróting. Barnaansing verður eisini. Kl. 18 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Leygardag kl. 11 Útifundur – um viðrar.
Sunnudag kl. 11 Møti,
kl. 14 Sunnudagsskúli.
Sang- og vitnimøti kl. 18.
Knud og Ulla Larsen tala.
www.frelsunarherurin.fo

**Sangkvøld í Havn**
Sunnukvøldið kl. 20 verður sangløta í hølunum hjá Grímu á gamla Meiarínum. MC Restorff, Anna Háberg og tónleikarar úr samkomuni Lívdin í Hoyvík luttaka. Eisini verður góður felagssangur. Kaffisteðgur verður og tiltakið er ókeypis.

**Fríkirkjan Oasan**
*Uppi á Brekku 3*
Fríggjakvøldið kl. 20 After Eight.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Martin Olsen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bøn. Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á Norðasta Horni og kl. 18 Møti í Missiónshúsinum v/ Øssur Kjølbro.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Fríggjadagin kl. 20, Ungdómsmøti v/ Sverra Kass, fyrigeving – misbrúkan av náði
Leygardagin kl. 20: Ungdómsgudstænasta v/ Bergi D. Joensen.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta, kl. 14 Sunnudagsskúli/-Junior. Kl. 19. Møti V/ Oggi Lamhauge, Søldarfjørður.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Peturi Martin Rasmussen, presti. Evnið: Sefanie profetur.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl. 18 Evangel. møti.
Týskvøldið kl. 20 Bønarmøti.
www.gospel.fo

**Meinigheitshúsið**
Leygardagin kl. 16.30 Bønarløta fyri kvinnur.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, vit møta í Meinigheitshúsinum og fara – um viðrar – niðan í Viðalundina, kl. 18 Møti v/ Tom Skaale, Streingjakórið í Sørvági syngur.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 verður Morgunmøti og samstundis barnaansing. Kl. 11.30 Samvera við drekkamunni og kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 12 verður eisini møti, har Páll Poulsen talar um Opinberingina kap. 20.
www.hebron.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Fríggjakvøldið kl. 20 biðja vit rósukransbøn hjá Erlu Mariu Simonsen, á Signabø.
Øll eru vælkomin.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Michael Bradley, prestur, í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi. Sunnudagsskúli kl. 14.
www.katolsk.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Miðvágur**
Leygarkvøldið kl. 20 Møti í bygdarhúsinum.
Sunnudagin kl. 11 sunnudagsskúli, kl. 18 Møti í bygdarhúsinum.
Mikukvøldið kl. 20 Undirvísing og bøn.

**Miðvágs Missiónshús**
Leygarkvøldið kl. 22 umleið, Opið hús aftaná gospelkonsertina á giljanesi.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli og kl. 18 Møti.
Hjartaliga vælkomin.

**Aglow, Vágar**
Møti verður í Missiónshúsinum í Sørvági leygardagin kl. 9.30, Annika Berg lutttekur. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Missiónshúsið Libanon í Sørvági**
Møtir verða við Edith og Niels Johannesen úr Danmark fríggjakvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin verður Morgunmøti við breyðbróting kl. 11, Jón Miðberg talar. Verið hjartaliga vælkomin.

**Felagsmissiónsvikan í Nesvík**
Leygardagin kl. 17 Bíbliutími um náðigávurnar v/ Reimund Langgaard, kl. 19.30 Møti við Árna Kjærbæk og Glyvrakórið syngur og kl. 22.30 Tiltak fyri ungdómin.
Sunnudagin kl. 15 felags sunnudagsskúli við Marion Poulsen og kl. 18 Møti við Malmberg Olsen og Felagskórið syngur.
Bønarmøti er á loftsstovuni 1/2 tíma undan hvørjum møti.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli og kl. 19 Møti við Tórfinn Hansen, innsamling til húsið. Aftaná verður drekka og hugnalig samvera.

## GULLBRÚDLEYP

30. mai kunnu Margit og John Rasmussen á Strondum halda gullbrúdleyp. Veitsla verður í Bygdarhúsinum á Strondum leygardagin 28. mai. Tey, ið vilja gleða gullbrúðarparið, vinarliga ringið á tlf. 448641 ella 221646 áðrenn 23. mai.

## SILVURBRÚDLEYP

Mánadagin 9. mai kunnu hjúnini Irena og Arni Joensen, Kaldbak, nú búsitandi á Møn í Danmark halda silvurbrúdleyp. Adr.: Sømarksvej 3, 4791 Borre, Møn DK.

## BRÚDLEYP

Í dag, 7. mai giftast í Samuelskirkjuni, Thorsgade 65, Keypmannahavn N. Daisy Johannesen, úr Klaksvík og Jens Christian Lolk, Hellerup. Brúdleypsadr.: Føroyahúsið, Vesterbrogade 17A, DK-1620 Kbh. V.

Í dag, 7. mai kl. 16.00 giftast í Miðvágs kirkju Laila Vang Durhuus og Benni Haraldsen, Miðvágur. Døgurði verður fyri innbodnum kl. 18.00. Øll eru vælkomin eftir kl. 21.00 í hølinum hjá Ingu Svabo, Miðvágur.

Í dag, 7. mai kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Anja Müller og Heri Næss Rasmussen, úr Tórshavn. Veitslan verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Hósvík.

Leygardagin 14. mai kl. 15.00 giftast í Frelsunarherinum í Vági, Emy Margretha Kjærbæk, Vágur og Jens Knudsen, Vágur. Døgurði verður fyri innbodnum á Hotel Øravík. Opið hús verður í Frelsunarherinum í Vági frá kl. 21.30.

Leygardagin 14. mai giftast í prestagarðinum í Fuglafirði Anna Margretha Sølvádóttir úr Leirvík og John Eriksen frá Svendborg. Vælkomst verður í Pálsstovu kl. 19.30.

Leygardagin 21. mai kl. 14.00 giftast í Kelduni í Skálafirði Guðrun Clementsen Hoyvík og Hans Ove Johansen, Eiði. Veitslan verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.00. Tey, ið ynskja at gleðast saman við okkum henda dag, verða vinarligast biðin um at siga frá áðrenn 8. mai á tlf. 316714 ella 423109.

Leygardagin 21. mai kl. 13.00 giftast í heiminum Randi Simonsen og Karsten Jespersen, Norðdepli. Tey, ið vilja gleðast saman við brúðarparinum, eru vælkomin í hølið hjá Arbeiðsmannafelagnum í Norðdepli millum kl. 18.00 og 24.00.

Leygardagin 28. mai kl. 16.00 giftast í Glyvra kirkju Annika Djurhuus og Øssur Hammer. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið, kunnu ringja 227876 ella 212076 áðrenn 18. mai.

Leygardagin 4. juni giftast í Fríðrikskirkjuni á Toftum Hildigerð Højgaard, Saltnes og Pól á Sondum Óskarson, Sandur. Veitslan verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma verða biðin um at siga frá á tlf. 229302, 448056 ella 361652 áðrenn 25. mai.

## 60 ÁR

11. mai fyllir Ingeborg Vinther, Vágur, 60 ár. Føðingardagurin verður hildin í VB-húsinum í Vági leygarkvøldið 21. mai kl. 19.00. Tey, ið vilja vera við til føðingardagshaldið, verða biðin um at siga frá á tlf. 373427, 312101 ella 212102 innan leygardagin 7. mai.

## KONFIRMATIÓN

8. mai konfirmerast í Fjelstrup kirke Ruth Dam Kulmbach, dóttir Estrid Dam, Argir og Jacob Kulmbach. Adr.: Præstevænget 8, Fjelstrup, 6100 Haderslev.

14. mai konfirmerast á Rainbow Hotel, Sandvika, Robin Mikkelsen, sonur Thyru Mikkelsen. Adr.: SP Muntekosvej 21, 1346 Gjettum.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

***Bøn***
*Takk góði Gud fyri skaparverkið. Hjálp okkum at fara væl um tað. Takk fyri náði tína. Takk fyri at tú gevur tær far um hvørt einstakt menniskja. Halt tína signandi hond yvir landi og fólki okkara og verj okkum frá øllum illum. Verð hjá teimum ið fingu tungar byrðar at bera, hjá teimum ið syrgja og sakna. Hjálp okkum at liva tær til æru og okkara medmenniskjum at gagni. Í Jesu navni. Amen!*

Stórtsæð allar kristnar kirkjur í Heiminum kunnu taka undir við ápóstólsku trúarjáttanini. Ikki tí, henda trúarjáttan stendur ikki beinleiðis í Bíbliuni, men er ein samandráttur av mest tíðandi pørtunum í kristnu trúnni.

Ápóstólska trúarjáttanin var ætlað sum vernd móti rangari læru. Í nøkrum av kirkjuliðunum var heiðin religión blanda saman við kristnu trúnni. T.d. trúu summi ikki, at Jesus var risin upp frá deyðum. Tí hittust kirkjuleiðarar frá Miðalhavslondunum til fundar í 2 -300 talinum eftir Krist, at samtala um hvat sonn kristin trúgv var.

Úrslitið av hesum kirkjufundum var m.a. Ápóstólska trúarjáttanin, sum enn verður játtað, sum sonn tulking av Bíbliuni.

Fyrsta greinin í trúarjáttanini ljóðar soleiðis: Eg trúgvi á Gud Faðir hin alvalda skapara himins og jarðar.

Hetta merkir, at eg í trúnni knýti meg til tað, sum bíblian lærir meg um Gud og alheimin: At Gud hevur skapað alt tað, ið til er, og uppiheldur tí í tráð við vilja sín.

Her er ikki spurningur um matematik ella jarðfrøði, sum knýtir seg til tað, sum vit kunna merkja við okkara sansum, men um eg trúgvi á tað, sum Guds orð lærir okkum, eisini um skapan alheimsins.

»Við trúgv fata vit, at heimurin er skipaður við Guds orði, so at tað, sum sæst, ikki er vorðið til av tí, sum er til sjóndar.«(Hebr.11,3)

Mangt av tí, sum stendur í trúarjáttanini stríðir í móti sonevndari almentgaldandi vitan og vísund ídag, eins og tað eisini gjørdi tað á Jesu døgum. Men tessvegna blívur Guds orð ikki ósatt.

Heldur hinvegin, tí er ongantíð so átrokandi neyðugt hjá okkum, at lesa og hoyra Guds orð, sum júst nú á døgum. Tað er tað, sum gevur trúnni á hin trýeinda Gud lív og føði, og sum grundfestir vón okkara á tað himmalsku dýrdina.

»Sælur er maður, hvørs hugur stendur til harrans lóg og yvir lóg hans grundardag og nátt.«(Sálmur 1,1-2)

Harrin signi dagin fyri okkum.

Alvalds Guð, vit prísa tær,
lova hátt í jarðar tjøldum
tíni æru víða hvar
vilja vit við einglafjøldum
falla tær til fóta nú
tekkja tína dýrd í trú.

Les víðari um trúnna úr Lítlu Katekismus (Stendur í stóru Sálmabókini)

**Sverri Steinhólm**